Búskapur og vinna:

## Sigla væl

Tað gongur væl í donsku sjóvinnuni. DFDS og Torm, sum eru ávikavist næststørsta og triðstørsta reiðaríið í Danmark, hava júst boðað frá, at bæði høvdu størri avlop í fjør enn í 2000.

Hjá DFDS var rakstrarúrslitið 202 mió. krónur, og tað var meiri enn tvær ferðir so gott sum árið fyri. DFDS sigur, at reiðaríið hevði framgongd bæði í farma- og ferðafólkaflutninginum.

Hjá Torm var úrslitið í fjør næstan tvær ferðir so gott sum í 2000. Avlopið í rakstrinum var 530 mió. krónur. Leiðslan í Torm sigur, at hóast afturgongd á altjóða flutningsmarknaðinum hevur felagið staðið seg væl á tí marknaðinum, sum flytir ymiskar servið-gjørdar oljuvørur.

Størsta danska reiðaríið, A. P. Møller, fer at kunngera sín roknskap tann 26. mars.

## Sviar keypa danskt

Samstundis sum ein norsk kanning vísir, at norðmenn keypa meiri í Svøríki nú enn nakrantíð, vísir ein donsk kanning, at sviar hava ongantíð keypt so nógv í Danmark sum nú.

Vøksturin hevur verið ógvuliga sjónligur seinastu trý árini, og árið í fjør var einki undantak. Í 2001 keyptu sviar fyri 3,2 mia. krónur í Danmark, og tað er 1,3 mia. krónur meiri enn árið fyri. Sjálvt um nógvir danir eisini fara yvir um Oyrasund at keypa, vísir kanningin, Danmark hevur stórt avlop á marknahandlinum við Svøríki. Hildið verður, at danir keyptu fyri 0,6 mia. krónur í Svøríki í fjør.

Orsøkin til, at sviar gera meiri av at fara til Danmarkar at keypa, er, at tað er vorðið lættari, eftir at fast samband er komið um Oyrasund, og at svensku ferðareglurnar eru linkaðar. Ein triðja orsøkin er, at svenska krónan hevur verið fallandi í virði mótvegis donsku krónuni.

UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael tikið seg aftur – Arafat ivast


Mynd: Reuters

**Ísraelski herurin tók í gjár sínar seinastu stríðsvognar úr teimum palestinsku býunum. Men palestinski leiðarin, Yasir Arafat, sigur, at afturtøkan er bert ætlað at sissa amerikanararnar**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

- Teir hava tikið stríðsvognarnar úr býum okkara, áðrenn amerikanski semingsmaðurin, Anthony Zinni, kemur higarso hetta er ikki annað enn eitt av teirra vanligu propagandatiltøkum, segði Yasir Arafat í gjár.

Hóskvøldið gav Ariel Sharon, forsætisráðharri herinum boð um at fara úr teimum palestinsku býunum, og í gjár kunngjørdi herleiðslan, at hon hevði tikið hermenninar úr býunum Ramallah, Qalqilya, Tulkarem og Betlehem á Vestara Áarbakka og úr flóttafólkaleguni al-Boureij í Gaza-geiranum. Men herleiðslan gjørdi vart við, at hermenn framvegis stóðu á varðhaldi kring býirnar og flóttafólkaleguna.

Avgerðin hjá ísraelsku stjórnini at hertaka býin Ramallah fyrst í vikuni var størsta ísraelska hernaðartiltakið í teimum palestinsku økjunum síðani kríggið í 1967. Ísraelsmenn hava sagt, at tiltakið varð neyðugt av trygdarorsøkum.

Hóskvøldið kom amerikanski semingsmaðurin, fyrrverandi generalurin Anthony Zinni, til Ísraels. Frammanundan hevði stjórnin í Washington lagt stórt trýst á ísraelsku stjórnina fyri at fáa hana at taka herin úr teimum palestinsku økjunum.

### Vápnahvíld ella frið

Á semingsferðini fer Anthony Zinni at royna at fáa ísraelsmenn og palestinar til samráðingarborðið. Grundarlagið undir royndum hansara er vápnahvíldaruppskotið, sum CIA-stjórin, George Tenet, gjørdi í fjør, og sum m. a. mælir til at skipa ein geira millum ísraelsmenn og palestinar.

Sharon hevur sagt, at hann er til reiðar at tosa um vápnahvíld. Arafat hellir meiri til friðaruppskotið, sum saudiarabiski krúnprinsurin hevur lagt fram, tí tað hevur til endamáls at fáa eina endaliga loysn á kreppuni og ikki bara eina vápnahvíld. Men Arafat hevur sagt, at tað stóra tiltakið hjá ísraelska herinum í vikuni hevur næstan beint fyri hesum møguleikanum.

Abdullah krúnprinsur hevur sagt, at hann fer at leggja friðaruppskotið fyri fundin, sum arabiska samgongan fer at halda í beitut seinni í hesum mánaðinum, men at tað er treytað av, at Arafat verður á fundinum. Ísraelska stjórnin sigur, at Arafat skal hava loyvi úr Jerusalem, skal hann til Beirut, men hesum hevur Arafat sýtt fyri at lurta eftir.

- Tað er nakað, sum eg ætli mær at avgera sjálvur. Eg havi rætt at fara, og eingin skal forða mær, segði hann hósdagin.

# Mæla til savningarstjórn í Zimbabwe

**USA og Bretland taka undir við einum suðurafrikanskum uppskoti um at fáa zimbabwiska forsetan, Robert Mugabe, at skipa eina savningarstjórn saman við andstøðuni**

ZIMBABWE
*Árni Joensen*

Tá suðurafrikanski varaforsetin, Jacob Zuma, kom til zimbabwiska høvuðsstaðin Harare hósdagin, hevði hann eisini onnur ørindi enn at ynskja Robert Mugabe, forseta tillukku við sigrinum á forsetavalinum seinasta vikuskiftið.

Bretska blaðið Independent skrivaði í gjár, at í viðførinum hevði Zuma eisini eitt uppskot frá suðurafrikansku stjórnini, sum mælti Mugabe til at skipa eina savningarstjórn saman við andstøðuleiðaranum Morgan Tsvangirai og flokki hansara Fylkingini fyri demokratiskari broyting.

Almennu myndugleikarnir í Zimbabwe siga, at Mugabe vann forsetavalið, men bæði innanlands og uttanlands verður forsetin lagdur undir umfatandi valsvik.

Forsetin í Nigeria, Olusegun Obasanjo, skal eisini hava biðið Mugabe skipa eina savningarstjórn saman við andstøðuflokkinum.

### Fær stuðul

Sambært Independent er tað suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, sum er komin við hugskotinum um eina savningarstjórn í Zimbabwe, og blaðið sigur seg hava fingið váttan fyri, at stjórnirnar í London og Washington taka undir við suðurafrikanska uppskotinum.

Sambært Independent vónar Mbeki, at uppskot hansara kann forða fyri einari kreppu millum Vesturheimin og Zimbabwe, tí ein tílík kreppa kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri tann syðra partin av Afrika. Samstundis kann Mbeki slappa burtur úr teimum nógvu atfinningunum frá teimum, sum halda, at hann hevur vent eygunum burtur frá tí, sum hendi í sambandi við forsetavalið í Zimbabwe.

Úr Norðurlondum:

## Minni oljudálking

Norska stjórnin krevur, at dálkingin hjá oljufeløgunum skal minka munandi. Í sambandi við komandi boringar í Barentshavinum hevur stjórnin gjørt av at gera eina nýggja reglugerð um dálkingina frá slíkum boringum, og stjórnin hevur gjørt greitt, at einki felag fær loyvi at bora, fyrr enn nýggja reglugerðin er liðug.

Stjórnin hevur eisini gjørt av at kanna, hvørja ávirkan oljuvinna kann fáa á viðurskiftini í Barentshavinum. Oljufeløgini høvdu boðið sær til at hava umsitingina av hesum kanningum um hendi, men hósdagin boðaði Einar Steensnæs, oljumálaráðharri frá, at feløgini fáa ikki umsitingina.

## Kanna ikki fleiri

Í Danmark hava myndugleikarnir gjørt av at steðga arbeiðinum at kanna, hvussu mangir og hvørjir arbeiddu saman við gomlu eysturtýsku fregnartænastuni Stasi. Loyniliga danska løgreglan PET og fregnartænastan hava kannað skuldsetingar ímóti sjey dønum, men higartil er bara ein maður ákærdur og dømdur fyri at hava njósnast fyri gamla Eysturtýskland. Hann fekk fýra mánaða fongsul.

Løgmálaráðið í Keypmannahavn hevur nú gjørt av at steðga kanningararbeiðinum. Sagt verður, at tað er ikki grundarlag fyri at reisa fleiri ákærur.

## Dýrt vaktarhald

Vandin fyri, at onkur skal gera seg inn á amerikansku og ísraelsku sendistovurnar í Oslo, kostar norsku løgregluni nógv arbeiði og nógvar pengar. Hvørt samdøgur eru 20 løgreglumenn á varðhaldi við tær báðar sendistovurnar, og hetta seinasta árið hevur vaktarhaldið kostað løgregluni 12 mió. krónur.

USA umhugsar at byggja eina nýggja og tryggari sendistovu í Oslo.



UTTAN ÚR HEIMI

# Írland - eitt øðrvísi land


*Bertie Ahern, forsætisráðharri greiðir atkvøðu á fólkaatkvøðuni. Úrslitið kann gerast bæði honum og katólsku kirkjuni ein dyggur smeitur*
*Mynd: Reuters*

**Teir írarnir, sum vóru ímóti at herða landsins reglur um fosturtøku, vunnu ein tepran sigur á fólkaatkvøðuni, men hóast sigurin var tepur, kom hann sum ein jarðskjálvti fyri stjórnina og ta katólsku kirkjuna**

BAKGRUND
*Árni Joensen*

Tað finnast ikki mong lond á okkara leiðum, har stjórnin er til reiðar at skriva út fólkaatkvøðu fyri at banna kvinnum at fáa fosturtøku, sjálvt um vandi er fyri, at tær fara at taka lívið av sær.

Upprunin til orðadráttin og fólkaatkvøðuna í Írlandi var í veruleikanum eitt óhugnaligt mál. Ein 14 ára gomul genta gjørdist við barn, tá faðir vinkonu hennara neyðtók hana. Hetta var fyri tíggju árum síðani. Írsku myndugleikarnir sýttu fyri at lata gentuna sleppa av landinum at fáa fostrið tikið. Men írski hægstirættur broytti avgerðina, tá tað kom fram, at gentan hevði hótt við at taka lívið av sær. Rætturin gav gentuni loyvi til fosturtøku - ikki í Írlandi kortini, men í Manchester í Onglandi.

Maðurin, sum hevði neyðtikið gentuna, fekk bert fýra ára fongsul. Í uppskotinum, sum stjórnin legði út til fólkaatkvøðu, varð skotið upp, at kvinnur, sum fáa fosturtøku, skulu fáa 12 ára fongsulsrevsing.

### Politisk megi

Bertie Ahern, forsætisráðharri hevur neyvan verið heilt greiður yvir avleiðingarnar, tá hann gjørdi av at halda fólkaatkvøðu um fosturtøkulógina. Bløðini vóru á tremur av lesarabrøvum. Tey flestu vóru varisliga orðað, men hinvegin var eingin ivi um boðskapin aftanfyri: Ein hvøss atfinning at dupultmoralinum.

Og spurningarnir, sum hanga í luftini nú eftir fólkaatkvøðuna, eru fleiri: Nær fer tað írska samfelagið at viðurkenna, at 7.000 kvinnur á hvørjum ári fara til Bretlands at fáa fosturtøku? Hvussu kann Bertie Ahern, sum sjálvur er fluttur frá konuni og inn til ein av sínum skrivarum, rætta tann moralska fremstafingurin ímóti øðrum? Og hvussu stórt álit kunnu fólk hava á teimum monnum, sum standa á odda fyri katólsku kirkjuni eftir tær nógvu og óhugnaligu avdúkingarnar av tí, sum veruliga hendir í kirkjuni?

- Latum okkum tosa um kvinnurnar í hesum landi. Seinastu 20 árini hava meiri enn 100.000 írskar kvinnur fingið fosturtøku, og tey flestu kenna onkra teirra, stóð í einum av teimum nógvu lesarabrøvunum upp undir fólkaatkvøðuna.

Síðani fólkaatkvøðuna hevur Berti Ahern gjørt alt fyri at doyva ósigurin. Hann hevur m. a. víst á, hvussu tepur meirilutin ímóti uppskotinum var, og kirkjan, sum stuðlaði uppskotinum av fullum huga, hevur sýtt fyri at gera nakrar viðmerkingar til úrslitið.

Men eitt tykist víst. Tann politiska megin, sum liggur í úrslitinum, verður ikki ruddað av vegnum í einari handavend ella við tøgn. Fyri fyrstu ferð hevur írska fólkið víst, at tað er til reiðar at seta seg upp ímóti ovurstóru ávirkanini hjá katólsku kirkjuni

Atkvøðugreiðslan gjørdi eisini ein greiðan skilnað millum býirnar og bygdarsamfelagið. Í Dublin var meiriluti ímóti stjórnaruppskotinum á øllum valstøðum. Í býnum eru nógvir ungir veljarar, og teir hava fleiri ferðir víst, at teir vilja hava Írland broytt til eitt nútímans samfelag, og at teir sýta fyri at lata seg tøla av moralskum viðmerkingum ella leiðbeiningum frá kirkjuleiðarum.

### Kvinnurøddin

Tað er heldur eingin ivi um, at røddin hjá teimum írsku kvinnunum er vorðin týðiligari við fólkaatkvøðuni.

- Úrslitið hevur ikki loyst tann trupulleika, at á hvørjum ári fara 7.000 írskar kvinnur til Bretlands at fáa fosturtøku, segði Bertie Ahern, forsætisráðharri eftir fólkaatkvøðuna, og tí hevur hann rætt í. Men tað er ikki óhugsandi, at írski almenningurin fær eina aðra uppfatan av trupulleikanum enn hana, sum forsætisráðharrin sjálvur hevði í tonkunum.

Tað er ikki so leingi, til írar aftur skulu á valstaðin. Teir skulu velja nýtt tjóðarting, og Berti Ahern hevði ivaleyst hugsað sær at fingið eina aðra byrjan til valstríðið enn hana, hann fekk.

## ES eigur at boða Útnorði frá um tað vil hava okkum uppí

**- Fáa vit í Útnorði eitt fiskivinnupolitiskt tekin um, at ES vil hava okkum uppí, fara vit at umhugsa støðu okkara, segði íslendski uttanríkisráðharrin, Halldór Ásgrímsson, í Berlin hósdagin.**

ÚTNORÐUR OG ES
*Árni Joensen*

Tað var í einum fyrilestri í Týska uttanríkispolitiska felagnum í Berlin, at íslendski uttanríkisráðharrin kom við tí, ið verður tulkað sum eini greið boð til ES: Ísland er til reiðar at søkja um limaskap í Evropasamveldinum, men bert um samráðingarnar føra til eitt úrslit, sum íslendingar kunnu góðtaka. Hann vísti samstundis á, at higartil er tað felags fiskivinnupolitikkurin hjá ES, sum hevur verið tann størsta forðingin.

- Men fáa vit tað rætta tekinið, nú ES er í ferð við at endurskoða fiskivinnupolitikkin, fara vit at umhugsa støðu okkara, segði Halldór Ásgrímsson og legði afturat:

- ES eigur at boða Íslandi, Noregi, Grønlandi og Føroyum frá, um samveldið hevur áhuga í at fáa okkum uppí. Í dag er alt Útnorður uttanfyri, og høvuðsorsøkin er felags fiskivinnupolitikkurin.

### Avgera sjálvir

Halldór Ásgrímsson legði dent á, at íslendingar vilja hava sína fiskivinnupolitisku serstøðu, fer landið upp í ES. Hann segði, at allar avgerðir um at gagnnýta fiskastovnarnar undir Íslandi skulu takast í Íslandi, eisini kvotuásetingar.

- Eingin skal halda, at vit fara at søkja um limaskap í einum felagsskapi, sum krevur at fáa ræðið á okkara egna tilfeingi, segði uttanríkisráðharrin. Hann vísti á, at teir flestu fiskastovnarnir við Ísland eru einans í íslendskum sjógvi og tí ikki felags við onnur lond. Kortini legði hann afturat, at tað finnast stovnar, sum ferðast um íslendska markið, og sum tí kunnu kallast felags tilfeingi.

Sjálvur er Halldór Ásgrímsson fyri íslendskum ES-limaskapi. Í Berlin segði hann seg síggja trupulleikar fyri framman, og at tað er neyðugt við nýhugsan í Íslandi.

- Eg haldi, at tað ber til at finna eina loysn, men tað er greitt, at tað er neyðugt at samráðast um tað. Sum støðan er í dag, hevði tað verið sera gagnligt fyri orðaskiftið í Íslandi, um vit fingu staðfest, hvønn týdning orðið "felags" hevur í sambandi við fiskivinnupolitikkin, segði íslendski uttanríkisráðharrin.